VB-StÍF 33-21 (15-13):

# Upp á heiðursmerkjapláss



*Eftir at hava tapt báðar dystirnar fyri tveimum vikum síðani, kom VB aftur á beint, tá tær leygardagin spældu móti StÍF*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

**Eftir tvey tap á rað, vann VB seg leygardagin aftur á heiðursmerkjakós**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Trýstið var av álvara á VB, nú tær høvdu verið fyri tapi móti bæði Stjørnuni og Neistanum.

Tí var kravið um sigur enn størri, enn tað vanliga er, tá StÍF vitjaði, og partvíst tóktist hetta trýstið eisini at tyngja liðið. Stóran part av fyrra hálvleiki megnaðu gestirnir nevnliga væl at fylgja við, og tó at VB um miðjan hálvleikin beit nakað frá sær, so sluppu tær ikki heilt leysar. Tvørtur ímóti, so gjørdu gestirnir ein vørr beint undan steðginum, og so vóru bara tvey mál á muni, tá farið varð inn at hvíla seg.

Eftir steðgin kom tó annað lag á. VB setti fulla ferð á beinanvegin, og tí útspælinum megnaðu gestirnir ongantíð at matcha. Sum seinastu 30 minuttirnir liðu, so var spurningurin bara, hvussu stórur heimasigurin skuldi gerast.

Við sigrinum fekk VB aftur tikið seg framum Kyndil, sum seinastu vikurnar hevur lagt seg á bronsuplássið í deildini. Ein støða, sum tær grønu uttan iva vilja royna at halda fast um. Men samstundis ein støða, sum VB á ongan hátt fer at geva burtur. Tvørtur ímóti, so man málið hjá teimum helst vera at koma enn nærri oddinum.

### FAKTA UM DYSTIN

**VB-StÍF 33-21 (15-13)**
**Málskjúttar**
**VB:** Daiva Toumaite 11(3), Rannvá Augustinussen 9, Svava Vestergaard 6, Christina Holm 3, Laila Jespersen 2, Miriam Michelsen 2
**StÍF:** Rebekka Justinussen 6(1), Paula B. Jacobsen 4(1), Poula D. Olsen 3, Sunnfríð B. Johansen 3, Ninna K. Johansen 2, Elin Jacobsen 1, Guðrun Ólavsdóttir 1, Kirstin Olsen 1
**Brotskøst:** VB 5, StÍF 4
**Útvísingar:** VB 2, StÍF 2
**Dómarar:** Kári Hansen & Dánjal Hansen

### Flogbóltsstøður
**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 9 | 9 - 0 | 27 | 8 | 19 | 18 |
| 2 SÍ | 9 | 7 - 2 | 23 | 13 | 10 | 14 |
| 3 ÍF | 7 | 3 - 4 | 13 | 15 | -2 | 6 |
| 4 TB | 6 | 2 - 4 | 10 | 12 | -2 | 4 |
| 5 Mjølnir | 9 | 2 - 7 | 12 | 24 | -12 | 4 |
| 6 KÍF | 8 | 1 - 7 | 9 | 22 | -13 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v - t | sett | v sett | t sett | +/- stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 7 | 7 - 0 | 21 | 7 | 14 | 14 |
| 2 SÍ | 7 | 5 - 2 | 18 | 9 | 9 | 10 |
| 3 Mjølnir | 8 | 4 - 4 | 17 | 13 | 4 | 8 |
| 4 ÍF | 7 | 2 - 5 | 11 | 17 | -6 | 4 |
| 5 Nøvan | 7 | 0 - 7 | 0 | 21 | -21 | 0 |

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 11 | 10 - 0 - 1 | 323 | 213 | 110 | 20 |
| 2 Neistin | 12 | 10 - 0 - 2 | 329 | 231 | 98 | 20 |
| 3 VB | 11 | 8 - 0 - 3 | 298 | 232 | 66 | 16 |
| 4 Kyndil | 11 | 7 - 0 - 4 | 233 | 249 | -16 | 14 |
| 5 VÍF | 11 | 5 - 0 - 6 | 264 | 264 | 0 | 10 |
| 6 StÍF | 12 | 3 - 0 - 9 | 270 | 307 | -37 | 6 |
| 7 Søljan | 11 | 2 - 0 - 9 | 195 | 288 | -93 | 4 |
| 8 Tjaldur | 11 | 0 - 0 - 11 | 208 | 336 | -128 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 9 | 7 - 1 - 1 | 250 | 215 | 35 | 15 |
| 2 H71 | 9 | 6 - 1 - 2 | 266 | 215 | 51 | 13 |
| 3 VÍF | 9 | 5 - 0 - 4 | 252 | 251 | 1 | 10 |
| 4 StÍF | 9 | 5 - 0 - 4 | 231 | 239 | -8 | 10 |
| 5 KÍF | 9 | 2 - 0 - 7 | 229 | 258 | -29 | 4 |
| 6 Neistin | 9 | 1 - 0 - 8 | 243 | 293 | -50 | 2 |

KÍF-StÍF 22-26 (11-14):

# Strandingar hanga í

**Við sigri á KÍF í rótutari uppgerð megnaði StÍF at halda fast um fjarstøðuna til Kyndil**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Talan var sjáldan um tað góða hondbóltsspælið, tá StÍF vitjaði KÍF leygardagin.

Strandingar plaga annars at borga fyri kvikum og undirhaldandi hondbólti, men tann partin sást lítið til í Hoyvíkarhøllini. Heldur komu teir í nógvum førum í rótutar nærdystir við KÍF-verjuna, og tí gjørdist ferðin á dystinum heldur ikki nøkur serlig.

Kollfirðingarnir hinvegin megnaðu heldur ikki at leggja veruligt trýst á stranda-verjuna, og tí gekk so hampuliga javnt á fyrstu longu løtuna.

Stutt fyri steðgin kom tó nakað av ferð á. Fyrst og fremst, so fekk StÍF verjuna at rigga, og teir kundu tí toga seg nøkur mál framum.

Tann munin hildu teir fyri tað mesta fast um eftir steðgin. Heilt nær komu kollfirðingar í øllum førum ikki. Heldur gekk tað hinvegin, at StÍF skuldi økja um leiðsluna, og stutt fyri dystarlok vóru eisini sjey mál á muni.

KÍF fekk tó pyntað nakað um úrslitið seinastu løtuna, men í nær námind veruligum spenningi komu teir ikki.

Við sigrinum helt StÍF fast í fjarstøðuni upp til oddin. Ein fjarstøða, sum teir kunnu minka um, tá teir í seinasta umfarinum í grundspælinum taka ímóti oddaliðnum, Kyndli.

KÍF liggur hinvegin framfyrst og fremst, so tykist árið hjá teimum snúgva seg um botndystin móti Neistanum.

### FAKTA UM DYSTIN

**KÍF-StÍF 22-26 (11-14)**
**Málskjúttar**
**KÍF:** Karl Jóhan djurhuus 6, Mirko Milinkovic 3, Rógvi Weihe 3, Petur Martin Poulsen 3, Teitur Joensen 3, Arnbjørn Hansen 3(2), Gert Hansen 1
**StÍF:** Sveinur Justinussen 9(3), Bent Djurhuus 5, Artur Johansen 5, Bárður Danielsen 3, Borgar Danielsen 2, Hávardur Trúgvason 1, Tummas Johansen 1(1)
**Brotskøst:** KÍF 5, StÍF 5
**Útvísingar:** KÍF 2, StÍF 6
**Dómarar:** Kristian Johansen & Eyðun Samuelsen